## Holst skoraði

Tað eydnaðist ikki Lyngby at fáa úrtøku, tá ið annað av føroyingafeløgunum í superliguni hevði vitjan í Lyngby av FC Midtjylland sunnudagin. Fyrsta løtan var annars hugalig hjá FCM. Sekundvísarin hevði bara verið gott og væl eina ferð runt, tá ið Christian Lamhauge Holst setti bóltin í FCM netið. Tveir minuttir undan steðginum javnaði FCM við brotssparki, og trettan minuttir undan leikloki skoraði FCM sigursmálið til 2-1. Christian Lamhauge Holst var á vøllinum allar 90 minuttirnar, og Tem Hansen, sum ikki hevur fingið landsliðsboð hesa ferð, var á Lyngby beinkinum alla tíðina.



## Danmark sleppur undan Ljungbjerg

Leygardagin spæla Danmark og Svøríki týðandi EM-dyst í fótbólti. Kravið til Danmark er ein sigur, og møguleikin fyri tí er kanska vaksin eitt vet, nú ein av bestu spælarunum hjá Svøríki hevur givið avboð til dystin. Fredrik Ljungbjerg, ið spælir fyri enska felagið West Ham, hevur fingið ein skaða í lærkrikan, og hann fær ikki spælt ímóti Danmark leygardagin.

# ð ongantíð slept við Løkin




*Fróði Benjaminsen hevur lagt B36 á odda. Men longu minuttin eftir javnaði NSÍ, og so gjørdist talan um ein dyst, har partarnir fyri alt í verðini ikki vildu tapa*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Talan kundi neyvan verið um størri uppgávu enn ein oddadyst á útivølli. Men 18-ára gamli Jóan Pauli Jakobsen spældi ein branddyst, tá hann loysti landsliðsmálverjan av*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Á vinstra vongverja var Jóhan V. Gunnarsson framúr hjá B36. Pól Thorsteinsson bjóðaði seg ofta til í framrættaða NSÍ spælinum, men tað var meiri enn torført hjá honum og Jónhard Frederiksberg at sleppa til gjøgnumbrot og innlegg, tí ungi Gunnarsson maðurin við stuðli frá Herberti í Lon Jacobsen var so stinnur.

Á NSÍ miðvøllinum var Nenad Stankovic so sentralur, sum hann plagar at vera. Sjúrður Jacobsen helt upp á bóltin, og Bogi Løkin søkti tómu økini og bjóðaði seg støðugt til í samanspælinum. Uppleggið tóktist vera við longum diagonalsendingum út í síðurnar at liða B36 verjuna sundur. Hjalgrím Elttør var væl upplagdur í vinstra borði, og B36 hevði trupulleikar í høgra verjuborði.

Anderson, sum Jóhan Troest Davidsen hevði tjóður í, var einsamallur á toppinum fyrsta tíman, tá ið Sylla var í høgra borði og skuldi hjálpa Kenneth Jacobsen í verjupartinum. Tað er ikki júst styrkin hjá Sylla, og í 2. hálvleiki varð toppskjúttin fluttur fram á toppin, og Heini í Skorini varð fluttur úr vinstra borði og yvirum.

Hjalgrím Elttør kom fleiri ferðir til baklinjuna, men tað spurdist bara eina ferð úrslit burturúr. Í síðsta áloppinum undan steðginum streyk flata innleggið til handara stólpan. Bogi Løkin tamdi og smekkaði í nettakið aftanfyri Jóan Paula Jacobsen, og tá ið dómarin nøkur sekund seinni bríkslaði fyri hálvleiki, var støðan 1-1.

B36 leiðslumálið varð skorað av verjugeneralinum Fróða Benjaminsen ein minutt frammanundan NSÍ málinum. Jóhan V. Gunnarsson streyk í eitt tvey samanspæli við Berg Midjord til baklinjuna, flata innleggið varð blokerað til horna, og eftir eitt sindur av aftur og fram skoraði Fróði Benjaminsen.

Spælið loysnaði ongantíð, tí útgangsstøðan broyttist ongantíð. Báðir partar høvdu eitt stig við sær á vøllin, og báðir partar høvdu alla tíðina eitt stig á kontini.

NSÍ royndi at vísa vilja til meiri framrættað spæl, tá ið teir ofraðu eitt sindur í verjuni og settu framrættaðu Øssur Dalbúð og Andy Olsen á vøllin, men hóast Óli Hansen var frammi í øllum deyðbóltsstøðunum – eisini longu innkastunum hjá Einari Hansen - so restaði tað framvegis tyngdin og broddurin, sum skulu til fyri at lata upp hjá Fróða Benjaminsen, Jóhan V. Gunnarsson, Jóan Paula Jacobsen og hinum í B36 verjuni.

Tí varð eingin fagnaður og heldur einki vónbrot, tá ið útnyrðingurin stoytti seg omanyvir spælararnar og áskoðarafjøldina, ið ikki var heilt so stór, sum tað kundi roknast við, tá ið talan var um toppuppgerð, og bara hesin eini dysturin var í Eysturoy, fór í mongu bilarnar.